# Rætting

**Lýsing av valstøðunum til kommunuvalið í Runavíkar kommunu 9. november 2004**

Kommunuvalið fyri valstaðið í Runavíkar kommunu fer fram í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar:

Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Kommunuvalið fyri valstøðini í Skála kommunu fer fram í hesum støðum:

fyri bygdina Skála og í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina Skálafjørður í skúlanum í Skálafirði

Kommunuvalið fyri valstaðið í Oyndarfjarðar kommunu fer fram í skúlanum í Oyndarfirði.

Kommunuvalið fyri valstøðini í Elduvíkar kommunu fer fram í hesum støðum:

fyri bygdina Elduvík og í skúlanum í Elduvík fyri bygdina Funningsfjørður í skúlanum í Funningsfirði

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 - ella so leingi veljarar møta uttan steðg.




Saltangará, tann 28. oktober 2004

Felags kommunala valnevndin fyri Runavíkar-, Skála-, Oyndarfjarðar- og Elduvíkar kommunu

**Símun Mittún form.**

# Tríggir fótbóltsleikarar av landinum

**Levi Hanssen úr B36, Einar Hansen úr NSÍ og Christian Mouritsen úr HB fara í næstum uttanlands at royna fótbóltseydnuna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*At útlendskur áhugi er fyri einum 5-6 leikarum frá einum árgangi, er heilt óvanligt, heldur Jákup í Stórustovu, leikaraumboðsmaður*

Tað er einki dulsmál, at avrikini hjá yngru landsliðum okkara hava vakt stóran ans fyri føroyskum fótbóltsleikarum uttanlands. Ikki minst skapti framúr avrikið í U-17 kappingini í Finnlandi stóran áhuga fyri føroyskum leikarum, og ítøkilig úrslit hava eisini spurst burturúr hesum. Eitt nú tá Johan Troest Davidsen herfyri gjørdi sáttmála við Everton.

Men hann er ikki einasti leikarin, sum áhugi er fyri. Mánadagin fara Levi Hansen úr B36 og Einar Hansen úr NSÍ til hollendska Herenveen at royndarvenja. Hetta felag er eitt av teimum so vælkendu »talentdeplunum« í Hollandi, har ungir evnaríkir leikarar ferð eftir ferð hava ment seg til stórleikarar. Ikki minst hevur hetta felagið verið miðdepil fyri norðurlendskar leikarar.

Somuleiðis fer ungi HB-leikarin, Christian Mouritsen, uttanlands í næstum Hann skal til enska Manchester City, eftir at hann áður hevur verið í Everton.

Tað er Jákup í Stórustovu, sum umboðar føroysku leikararnar, og hann ásannar, at áhugin fyri føroyskum leikarum hevur verið vaksandi seinastu tíðina.

– Tað eru at kalla altíð fyrispurningar, tá yngru landsliðini spæla, men at útlendskur áhugi er fyri einum 5-6 leikarum frá einum árgangi, er heilt óvanligt, heldur hann.

– Eg rokni eisini við, at hetta er úrslit av tí arbeiði, sum nú í longri tíð er gjørt í bæði feløgunum og FSF. Og tað er at gleðast um í hesum sambandi, at Fótbóltssambandið nú hevur tikið stig til, at talentmenningin skal verða enn betri samskipað. Mín vón er í øllum førum, at hetta kann eggja feløgunum at leggja enn meira fyri í so máta, og eg ivist ikki í, at hetta fer at koma feløgunum til góðar, um so er. Bæði tí tey koma at fáa betri leikarar til besta liðið, og eisini tí tey kunnu fáa betri møguleika at skapa sær inntøkur við møguligari sølu av leikarum, staðfestir hann.





Forlagið Hellurnar
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard · Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo


# Jógvan á Lað fekk heiðursbræv

**Á samkomu í ÍSF-húsinum mikukvøldið handaði Heðin Mortensen, forseti ÍSF, Jógvan á Lað Heiðursskjal Poul E. Petersens sum viðurkenning fyri stuðul og áhuga føroyskari ítrótt at frama**

HEIÐURSBRÆV
*Tíðindaskriv*

Stjórn ÍSF hevur samtykt at lata Jógvan á Lað heiðursskjalið eftir tilmæli frá Fótbóltssambandinum.

Í grundgevingunum fyri viðurkenningini segði forseti Ítróttasambandsins m.a.:

»At Havnarmenn eru ernir av Jógvan á Lað sæst á øllum brøgdum. Hann verður av nógvum nevndur »Mister HB«. Og hetta er ikki at taka munnin ov fullan.

Tað er kanska hóskandi, at Jógvan á Lað, nú HB fyllir hundrað ár, verður heiðraður við heiðursskjali Poul E. Petersens. Hann hevur í ein mansaldur verið tvinnaður saman við virksemið í felagnum og føroyskum fótbólti sum heild.

Árini 1946-63 leikti hann við besta liðnum hjá HB, og tíðina, hann var niðri, leikti hann við ÍF Føroyum. Eisini á føroyska landsliðinum gjørdi hann vart við seg.

Jógvan røkti í mong ár álitisstørv innan ítróttin. Hann var í nevndini í HB í tíðarskeiðnum 1947-1972, helvtina av árunum sum formaður. Hann var formaður í bygginevndunum, tá HB bygdi felagshús fyrst við niðara vøll og síðan við ovara vøll. Hann hevur eisini verið úttøkumaður til landsliðið og stjórnarlimur í ÍSF.

HB valdi í 1992 Jógvan á Lað til heiðurslim. Hann er higartil tann einasti, sum hevur fingið hendan heiðurin.

Jógvan á Lað hevur í virki sínum víst dygdir sum ábyrgd, nærlagni og trúfesti. Hetta eru dygdir, ið ítróttarrørslan í Føroyum er grundað á.«

Heiðursskjal Poul E. Petersens varð fyrstu ferð latið í 2001. Endamálið við skjalinum er at heiðra fólkum, sum hava gjørt vart við seg og tænt ítróttini á serstakan hátt. Poul E. Petersen (1901-1977), sum hevur lagt navn til heiðursskjalið, var ítróttarlærari, -ráðgevi, -rithøvundur og fyrsti formaður ÍSF.

# Karstin skal verja KÍ-málið

Norðlýsið skrivaði hósdagin, at KÍ hevur gjørt sáttmála við Karstin Joensen, um at hesin komandi árið skal verja málið hjá KÍ.

Karstin hevur eisini áður vart KÍ-málið, men tá Jákup Mikkelsen í fjør kom til felagið, valdi Karstin at skifta til ÍF, har útlitini fyri spælitíð á besta liðnum vóru betri.

Somuleiðis skrivar Norðlýsið, at KÍ samstundis hevur longt sáttmálan við Atla Danielsen. Tað hevur annars ljóðað, at fleiri feløg hava ligið framvið eftir undirskriftini hjá honum, men tað verður so av ongum í hesum umfarinum.

Hinvegin verður talan helst eisini um onkra frágongd í KÍ. Tað er longu nakað síðani, at tað varð greitt, at Jákup Mikkelsen komandi ár fer at spæla við B36, og sum skilst, so fer árstalsfelagið í Havn í næstum at skriva undir sáttmála við Niclas NJiclassen, sum sostatt fer at spæla fótbólt í Havn komandi kappingarár.

**-jm**




UNITED seafood

## Maskinmaður

United Seafood søkir eftir maskinmanni til virkið í Tórshavn.

United Seafood Tórshavn framleiður serliga tosk og upsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. catering og retail vørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiðið á United Seafood í Tórshavn fer fram sambart innaneftirlitsskipan.
Í 2003 virkaði virkið um 5.000 tons av rávøru, og uml. 3000 tons av góðskaðum vørum

**Uppgávurnar hjá maskinmanninum verða m.a.:**
- Røkja maskinur á virkinum
- Røkja viðlíkahaldsætlan virkisins

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Prógv sum maskinsmiðjur

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**
- Góðan førleika innan el-skipanir
- Kunnleika til flakamaskinur
- Kunnleika til teldunýtslu
- Royndir frá líknandi arbeiði

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum.
Umsóknarfreistin er 15. november.
Allar umsøknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Ynski er at viðkomandi kann byrja sum skjótast.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

**UNITED SEAFOOD**
att : Klæmint Klein.
Postboks 218.
FO - 110 Tórshavn, Føroyar.
Telefon : 355555.
Telefax : 312631.


## Kunngerð

Vísandi til kunngerð frá Innlendismálaráðnum fer Kommunuval fram

**týsdagin tann 9. november 2004.**

Valið til Kommunustýrið á Viðareiði fer fram í gamla skúla.

**Atkvøðutíðin er frá: kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna ella til valnevndina.

Brævatkvøður skulu vera valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. november 2004.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða kommunuskrivstovuni ella valnevndini frá, helst innan kl. 18.00 mánadagin 8. november 2004.

**Valkort:**
Valkort eru send út við postinum og um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

*Minnist til at hava valkortið við á val.*

**Viðareiði tann 26. oktober 2004**
**Valnevndin á Viðareiði**
**Kristina Sjóstein, forkvinna**


TÓGVHANDILIN
BÚNIN
TIL SØLU
VIÐ INNBÚGV



Sp/f Grannskoðan · Klaksvíksvegur 28
700 Klaksvík · Boks 139 · Tel. 478 000

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**TIL SØLU**

**Volvo V40 1.8 Excelent - Sportline**



**Koyrt uml. 28.000 km - Árgang mai 2003**

**Útgerð:**
Leðurinntrekk, innbygd barnasetur, Aut. klimaanlegg, Cruise-control, Hita í forsetrum, Sport spoilarasett, 16" orig. alu-felgur, Antispinn, Tidy Car viðgjørdur og m.a.

Býligari bilur kann takast í býti.
Bilurin kann síggjast hjá VR-Bilum
tel. 322 110.

*Prísur*
kr. 248.000,-

**Ring tel. 421 534** ***eftir kl. 18.00***




-tað loysir seg!


## Heilivágur til eldri

Áhugaverdur fyrilestur verður á Lágargarði leygardagin 30. oktober 2004 kl. 13.30 til ca. kl. 17.30, um heilivág til eldri.

Fyrilestrahaldari verður Niels Horwitz, yvirlækni á geriatriskari deild á Bispebjerg Sjúkrahúsi.

**Málbólkur:** Sjúkrarøktarfrøðingar og læknar.

**Kostnaður:** Limir í FÁG4 koma inn ókeypis, onnur gjalda 50,- kr. við inngongina.

Møtið fjølment.

**Vinarliga**
**Nevndin í FÁG4**




Jólasølustevna
á Giljanesi

Aftur í ár verður
Jólasølustevna á Giljanesi
27. - 28. november 2004

Teir handlar, fyritøkur og onnur, sum ætla at verða við, verða biðin um at siga frá á tel. 222 411

MIÐVÁGS RÓÐRARFELAG